From: Tóri Højgaard <ToriH@ummr.fo>
Sent: hósdagur, 22. apríl 2021 13:08
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Cc: Poul Geert Hansen <PoulGeertH@ummr.fo>; Alda Joensen <AldaJ@ummr.fo>
Subject: Viðv. LM-139/2020 Uppskot til løgtingslóg um stuðul til listafólk í sambandi við COVID-19

Góði Hallur

Á fundinum mánadagin spurdi nevndin landsstýrismannin um ráðið hevði hoyrt frá nøkrum almannagagnligum felagsskapi nú ráðið arbeiddi við lógaruppskoti um stuðul til listafólk. Svarið var, at tað hevði man ikki. Tíverri er hetta ikki rætt.

KFUK vendi sær tann 14. mars til ráðið, og søkti um stuðul úr einum møguligum hjálparpakka sum fór at koma, ella úr hjálparpakka 3 um hesin varð latin upp aftur. Tann 9. apríl boðaði ráðið KFUK frá, at hjálparpakki 3 ikki fór at verða settur í gildi aftur, men at man arbeiddi við einum nýggjum lógaruppskoti ið skuldi veita stuðul til listafólk.

Tann 14. apríl vendir KFUK sær aftur til ráðið við einum skrivi ið er stílað beinleiðis til landsstýrismannin.

Av misgáðum vóru hvørki landsstýrismaðurin sjálvur, ella hini umboðini fyri ráðið, kunnaði um at samskiftið hevði verið við KFUK. Eg havi viðheft hetta samskiftið.

Vinarliga haldi okkum til góðar.

Vinarliga / Kind regards

Tóri Højgaard
Løgfrøðingur / Legal advisor
Dátuverndarfólk / DPO

Office: +298 306500
Mobile: +298 555023
torih@ummr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS AND CULTURE
Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 306500 / ummr@ummr.fo / www.ummr.fo